


# GASTRONOMISKUR KOKKANÆMINGUR TIL NORRÖNU

Søkt verður eftir gastronomiskum kokkanæmingi til galluna umborð á Norrönu at byrja skjótast gjørligt.

Smyril Line bjóðar áhugavert og avbjóðandi lærupláss sum gastronomiskur kokkur í einum altjóða umhvørvi. Lærutíðin er 3 ár og 9 mánaðar. 47 vikur av lærutíðini er á skúla í Aalborg, harav 20 vikur eru grundskeið.

**Vit vænta, at tú:**
- ert kreativur, lagaligur og hevur ábyrgdarkenslu
- hevur hug og evni at arbeiða saman við øðrum
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- ert fleksibul og hevur gott sinnalag

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi og krevjandi starv á einum stórum og fjølbroyttum arbeiðsplássi
- góðar umstøður og gott arbeiðsumhvørvið
- góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning
- arbeið og frítíð í lutfallinum 1 til 1

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt sambært galdandi sáttmála.

Størvini verða sett skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir tí rætta. Umsøkjarar, ið hava lokið grundskeið innan kokkafakið, hava fyrimun. Lærutíðin verður í hesum sambandi stytt við 20 vikum.

Umsóknir og CV skulu sendast við telduposti til hesa tilskrift innan mánadag 1. februar:

chef.manager@norrona.fo
Tel. 344850 / 344835

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini aðalsøluumboð í Bretlandi, Beligu, Fraklandi, Hollandi, Italiu, Pólandi og Svøríki. Smyril Line hevur eisini tætt samstarv við samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

SMYRIL LINE · YVIRI VIÐ STROND 1 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.FO





# 550 ráðstevnu-teldur stolnar

**Tjóvar hava stolið 550 Lenovo-teldur, sum vóru læntar út til veðurlagsráðstevnuna í Bella-Centrinum, og sum høvdu eitt virði á meiri enn tríggjar milliónir krónur**

STULDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Veðurlagsráðstevnan endaði fyri tey flestu uttan úrslit, men fyri nakrar tjóvar var ráðstevnan ein góð forrætning.

Ókendir gerningsmenn stjólu 28. desember 550 farteldur av merkinum Lenovo úr einum trailara, sum var parkeraður í Kolding.

Brúkshandlarin Tier 1 Asset hevði júst fingið farteldurnar aftur frá Bella-Centrinum, har tær vóru lántar út til grasrótafelagsskapir og til nýtslu á internetkaféum á veðurlagsráðstevnuni.

Tjóvarnir sóu møguleikan at stjala teldurnar, tá tær stóu á níggju plattum á trailaranum. Og umframt farteldurnar fingu tjóvarnir eisinifatur á einari rúgvu av ymiskari telduútgerð frá øðrum fyritøkum, sigur Peter Heimicke frá Tier 1 Asset við Ekstra Blaðið.





# Er títt lív KT?

Heldur tú, at tað er spennandi at arbeiða við KT? Og dámar tær at arbeiða í einum umhvørvi við spennandi fólkum? So hava vit rætta starvið til tín.

Uppgávurnar hjá telduumsitaranum eru í høvuðsheitum:
- at rekja og menna lokalar netskipanir
- at supportera brúkarar
- at samskifta við veitarar
- at taka lut í gerð av hagtølum

KT-umsitingin er partur av Fíggjar- & fyrisitingardeildini, har íalt 9 fólk eru, sum m.a. starvast við bókhaldi, journalisering, ávísing, reingerð, køkshjálp og telefonmóttøku. Í løtuni er ein KT-umsitari, og við tær verða tit tveir umsitarar.

**Førleiki:**
Talan er um eitt avbjóðandi starv, sum krevur, at tú hevur:
- førleika til sjálvstøðugt at skipa dagliga arbeiðið
- starvsroyndir innan umsiting av netum og skipanum
- relevanta útbúgving
- góð samstarvsevni

Fyrimunur er, um tú hevur kunnleika til at samansjóða skipanir í ymiskum umhvørvum.

**Vit bjóða:**
Eitt sjálvstøðugt starv í áhugaverdum unhvørvi við góðum møguleikum fyri skeiðluttøku og eftirútbúgving. Løn sambært avtalu. Miðað verður eftir at seta telduumsitaran skjótast til ber.

**Umsókn:**
Umsóknin skal sendast við teldu-posti til Mourits Joensen, deildarleiðara, á mourits@als.fo. Tú fært váttan, tá vit hava móttikið teldupostin.
Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 5. januar kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at senda ein teldupost til Mourits Joensen á mourits@als.fo. Tú kanst eisini ringja til hansara á 349550.

ALS

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 18 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.

Arbeiðsloysisskipanin • Tinghúsvegur 14
Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn •
Tel 349550 • Fax 349551 • als@als.fo • www.als.fo